# Nú er nóg mikið tosað

HEIDI PETERSEN
Løgtingskvinna



***Vinnupolitikkur í fokus:***
**Endamálið við vinnupolitikki Tjóðveldisfloksins er at tryggja eitt sjálvberandi og fjøltáttað vinnulív, sum verður grundarlagið undir einum sjálvstøðugum, samhaldsføstum, framkomnum og kappingarførum samfelag á altjóðastigi, har menniskjað og mentan er í sentrum, sigur Heidi Petersen, løgtingskvinna Tjóðveldisfloksins**

Tað vil siga, at alt vit gera og arbeiða fram ímóti, er við tí fyri eyga at skapa eitt samfelag, har allir borgarar hava møguleika at skapa sær eitt innihaldsríkt og virðiligt lív í samspæli við onnur menniskju.

Málini eru:
At vit gerast sjálvstøðug tjóð
At vit eru fíggjarliga óheft
At vit hava eitt blómandi mentunar og andslív
At vit hava høgt útbúgvið fólk
At árlig íløga á 3% av BTÚ verður gjørd í gransking og menning
At øll hava arbeiðsmøguleikar
At øll hava møguleika fyri egnum bústaði.
At øll sum tørva røkt og hjálp í dagligdegnum fáa tað
At øll sum hava tørv á sjúkrahúsviðgerð fáa tað
At stættarmunurin minkar

Hetta eru nøkur mál eg haldi vit skuldu sett okkum fyri hvussu Føroyar skulu síggja út í framtíðini. Tí uttan at definera málini, koma vit onga leið.

Bara tá málini eru greitt sett upp, kunnu vit fara til verka og finna út av hvussu vit náa málunum.

**Hvussu náa vit málum okkara?**
Grundsjónarmið Tjóðveldisfloksins er at privata vinnulívið verður rikið uttan stuðul úr landskassanum, meðan leikluturin hjá tí almenna hinvegin er at skapa góðar og støðugar karmar at virka undir, at skapa tað grundstøði ella undirstøðukervi sum skal til fyri at hava eina vælvirkandi vinnu, at tryggja vælferðina hjá borgarunum,( almanna- og heilsuverk) at nýta orku uppá útbúgving og gransking, at nýta orku uppá skapanarevni og mentan.

Eisini eiga vit at nýta orku uppá at útvega marknaðaratgongd og skapa vinnumøguleikar og samstarv úti í heimi. At samstarva um at fáa nýggjar vinnur á føtur, og menna vinnur ið hava góðar vakstrarmøguleikar, er ein týðandi táttur í vinnupolitikkinum.

Hvussu vit náa hesum málum vil eg royna at geva nøkur boð uppá her.

Útbúgvingarlig innsatsøkir innan: matvøruframleiðslu, biotøkni, leiðslumenning, framleiðslutøkni til sjóð- og flakavinnu, kunningar- og samskiftistøkni, eisini er íløga í vitan ein týðandi táttur (og eg taki undir við at útbúgvingarstøðið sum heild verður hækka, eisini innan eftirútbúgving og menning av arbeiðsførleikanum hjá ófaklærdum, sum frágreiðingin frá landsstýrismanninum eisini leggur upp til)

Útbúgvingartilboð innan allar listagreinir har skapanarevni hjá fólki mennast og gerast vinnuvegur (sangur og tónleikur, dansur og sjónleikur, málningalist og sniðgeving, softverdesign o.a.) er eisini eitt øki sum orka skal nýtast uppá

Granskingin má mennast og samskipast og hava miðvíst sikti, og munandi meira fíggjarorka, bæði almenn og privat má satsast uppá øki (taki als ikki undir við upplegginum um granskarapark hjá landsstýrismanninum, tí vit eiga at nýta og útbyggja verandi granskingarstøð og stovnar, eftir hansara leisti fer alt ov nógv fíggjarorka í betong og bygningar) útflutnings- og marknaðarføringsgrunn sum stuðlar marknaðarføring og útflutningi av vørðum og tænastum, harundir list, eigur at verða settur á stovn, heldur í dag enn í morgin, so átrokandi meti eg hetta at vera, tí hetta er eitt øki sum liggur fullkomiliga ódyrkað í dag , og tað kann onki land ella vinnulív liva við

At íløgur framhaldandi verða gjørdar í at útbyggja undirstøðukervini innan kunningar og samskiftistøkni, orku og samferðslu (harundir at gera altjóða flogvøll á best egnaða stað og undirsjóvartunnil til Sandoynna)

Íløgur í mál og mentan soleiðis at søga og samleikin fáa góðan gróðrarbotn og kunnu verða við at skapa eina sterka tjóð

Menna Føroyar sum ferðamannaland, harundir útbúgving í tænastum til ferðavinnuna

Útvegan av veiði-, vinnu- og samstarvsmøguleikum úti í heimi.

Vinnuráð- ella hugskotsbanka, sum veita vegleiðing og ráðgeving til íverksetarar

Lóggáva sum tryggjar ræðisrættin á tilfeinginum á føroyskum hondum

Ígongdsetara stuðul til nýhugsan og menning av nýggjum vinnum

Einskiljing av almennum ognum, har skipað verður fyri at almennar framleiðslufyritøkur gerast privatar vinnufyritøkur. Hetta skal gerast á tann hátt at tær verða lýstar alment til sølu og seldar um almenna partabrævamarknaðin

Skattapolitikkurin skipast so breiðastu herðarnar bera tyngstu byrðarnar og harvið er við at minka um stættarmunin

Endurskoða allar vinnulógir og gera tær smidligari at umsita og bøta um samskifti við vinnuna

Laga almennu umsitingina til føroyska samfelagið

**Nú er nóg mikið tosað**
Samanumtikið vil eg siga at nú er nóg mikið tosað um vinnupolitikk, tíðin er komin har meira skal til enn orðavavstur, nú má og skal nakað ítøkiligt henda. Líka síðani 1999 hevur man í Vinnumálaráðnum tosa um vinnupolitikk, men ongi ítøkilig úrslit fyriliggja.

Á fíggjarlógunum síggja vit bara almenna umsiting og framskriving av lønum. Nakrar íløgur verða eisini gjørdar, men haldi ikki tær stiga uppundir at bøta um karmarnar hjá føroyskum vinnulívi. Tey gyltu orðini um visión 2015 eru slettis ikki at finna aftur á nakrari raðfesting hjá landsstýrinum.

Heldur hinvegin eru prógv fyri tí beint øvugta, teir smáu spíranir sum hómaðust undir seinastu samgongu, er sitandi samgonga í ferð við at køva.

Vit kunnu nevna granskingina sum er skerd, vit kunnu nevna mentanina sum er skerd, vit kunnu nevna skattalættan, sum er vit til at økja um stættarmunin, har tey ríkastu fáa mesta lættan, vit kunnu nevna avgjøld sum raka sosialt skeivt (vegskatturin), vit kunnu nevna barnaverndarøki sum er lagt út til kommunurnar, sum tá landið fíggjaði var yvir ein progressivan skattastiga, har tey ríku rindaðu mest, til nú at verða fíggja við einum proportionalum skattastiga hjá kommununum, har øll rinda líka, líka mikið um tú vinnur eina arbeiðaraløn ella eina stjórðaløn.

**Fult tjóðarfrælsi og sjálvberandi búskap**
Endamálið við øllum hesum er at fáa bygt upp ein sjálvberandi búskap, har eitt fjølbroytt føroyskt vinnulív, sum kann virkar heima hjá okkum og um allan heim, er við til at vinna útlendskan kapital til landið, og á tann hátt økja um vælferðina hjá einstaka borgaranum.

Hetta hevur sum tað endaliga málið at vinna Føroysku tjóðini fult tjóðarfrælsi og at hava møguleika at handla og virka á altjóða pallinum, í samstarvið og á jøvnum føti við aðrar tjóðir, í einum altjóða gjørdum heimi.

# Útlendingar, fjølmiðlar, hvat heldur tú sjálv/ur?

JASPUR JOHANNESEN



Fakta er, at krevja 975 fastbúgvandi útlendingar í Føroyum familjusamanføring, kunna teir gerast til 4875. 2% útlendingar kunna gerast til 10% innflytarar. Her eru ikki norðurlendingar tiknir við. Løgmaður tosar um eina jaliga viðferð. Hvar eru fjølmiðlarnir og politikararnir og hvar eru vit sjálvi stødd í hesum álvarsmáli.

Vit eiga hetta landið tí vit fingu tað frá okkara foreldrum. Tað er politikkurin nú, ið avger samfelagið ið børn okkara skula liva í.

**Arbeiðsloyvi er ikki tað sama sum ríkisborgaraskapur**
Tað er neyðugt at minnast, at tá ein útlendingur kemur inn uppá eitt eitt ára arbeiðsloyvi, so er tað tað ið avtalan snýr seg um. Um tað verður longt eitt ár afturat, so er tað tað ið avtalað er. Føroyska samfelagið er ikki bundið longur enn hetta. Sjálvandi eigur ein umsøkjari at fáa svar skjótast tilber, men eitt seinkað svar kann ikki geva framíhjárættindi, tað er heilt burturvið. At løgmaður fyrst og fremst tosar um at geva eina jaliga viðferð bert í ein útlendingur er komin inn í landið, er ábyrgdarleyst um tað ikki verður viðgjørt útfrá hvat ið best tænir okkara landi og fólkinum ið her býr. Løgmaður skal umboða áhugamálini hjá tí fólki ið hevur valt løgtingið. Útlendingar eru gestir í landi okkara og eiga at fáa eina góða viðferð. Men tað hevur einki við borgararætt at gera. Føroyar skulu hava ein skilagóðan útlendingapolitik, sum umframt fyrst og fremst at verja okkara land, eisini eigur at tryggja teimum útlendingum ið gerast fastbúgvandi trygg og góð kor. Skyldan hjá politikarunum er at síggja til at vit ikki gera somu mistøkini ið hini norðurlondini hava gjørt á útlendingaøkinum. Tað at gerast fastbúgvandi í Føroyum eigur at viðgerast undir okkara fortreytum. Hvat samfelag er tað ið vit ynskja at liva í og hvat samfelag er tað ið vit ynskja at geva okkara børnum at liva í.

**Eitt trygt samfelag**
Tað er neyðugt at fáa ein útlendingapolitikk, ið varðveitir børnum okkara eina frælsa og bjarta framtíð. Tað er eitt framíhjárættindi at vit hava eitt gott og trygt samfelag bæði fyri børn og vaksin. Eitt samfelag har tað ber til at vera samdur og ósamdur og at tað tó er rímuliga rúmligt fyri hvønn tann sum vil. Tað verður ongantíð lýtaleyst. Til tað eru vit ov ófullkomin, men vit hava eitt gott land at liva í.

**Varsemi má til um umstøðurnar skulu varðveitast**
Tað er ein sannroynd at um vit fáa ein útlending ið inniheldur áleið ta mentan ið vit hava herheima, um tað so er protostantur, katolikkur ella gudloysingur, so vil hetta ikki broyta okkara samfelag nevnivert. Hinvegin, um vit, eins og í eitt nú Danmark, fáa eitt ov høgt tal av muslimum, so fáa vit ovurhonds trupulleikar. Hetta er ikki nakað ið vit kunna ávirka. Ávirkanin er fastløgd í islamsku læruni og vit kunna bara hyggja uttan um okkum fyri at síggja trupulleikarnar, ið nú eru veruleiki hjá flestu grannatjóðum okkara.

**Allar mentanir rúmast ikki undir somu lon**
Mistakið varð, at eins og fleiri onnur lond, hildu eisini danir at islam kundi integrerast í danska samfelagið. Tað ber einfalt ikki til. Tað er sum at royna at upphevja tyngdalógina. Tað er ógjørligt. Islam kann ikki integrerast í eitt vesturlendskt demokratiskt samfelag. Tann sum vil hava tað at bera til, vil støðugt royna at finna nýggjar hættir at greiða frá, hví tað ikki enn hevur eydnast. Tað skal viðmerkjast at ein lítil islamskur minnilutabólkur í einum landi er eingin sjónligur trupulleiki. Trupulleikin sæst fyrst tá tað er ein ávís nøgd av muslimum í einum landi í mun til fólkatalið. Hetta er ein partur av islam, ið er einfaldur at skilja um ein setur seg inn í tí islamsku læruna. Tað er bert við at doyggja í bardaga fyri islam at ein muslimur kann vera heilt vissur í at ogna sær paradís. Annars er tað knýtt at hansara lívsverki og tí endaliga dóminum ið Allah velur at fremja. 60 % av versunum í koranuni snúgva seg um jihad/heilagt kríggj. Fyri at fremja jihad/heilagt kríggj, er loyvt muslimum at nýta svørð, lygn og svik. Islam merkir at geva seg undir. Muslimur, merkir ein ið gevur seg undir Allah. Málið er at leggja allan heimin undir islam. Allah áleggur øllum teimum ið geva seg undir hann at fremja jihad/heilagt kríggj. Tí er tað ómøguligt at integrera islam í eitt vesturlendskt demokratiskt samfelag. Annað má lúta, demokrati og islam rúmast ikki saman. Hetta mást tú vita fyri at kunna skilja hvussu hugsunarhátturin er hjá einum rætttrúgvandi muslimi.

**Vit hava onga søguliga umbering**
Útlendingamálið er eitt meira, og tað rættuliga nógv meira álvarsligt mál, enn bert at viðgera eitt fokus á innlendismálaráðið, á landsstýrismannin, á tann einstaka útlendingin, á ítróttin, ella á hetta og á hatta. Hvussu ber tað til, at tit, fjølmiðlafólk okkara, ið skulu eitast og ætlast at vera objektiv og tæna okkara samfelag, kunna vera so einsporað, subjektiv og tískil beinleiðis samfelagsskaðilig. Hví kanna tit ikki ístaðin fyrst hvørjar avleiðingar útlendingapolitikkurin hjá Noregi, Svøríki ella Danmark hevur havt og viðgera sakligt útfrá tí. Og tit politikarar ið hava latið tykkum valt inn á føroya løgting at tæna Føroyum og áhugamálum okkara, hvat hugsa tit fyri tykkum. Hvat siga danir nú. Hvønn útlendingapolitikk vildi tann vanligi danin valt nú um tað bar honum til. Men, hansara fjølmiðlafólk og politikkarar valdu fyri hann í sjeytiárunum. Ein kann siga at teir vistu ikki betur, men tað umberingina hava vit ikki. Vit eru tredivu ár aftanfyri á hesum økinum og eru í ferð við at endurtaka søgunnar mistøk, hóast vit skilliga síggja avleiðingarnar.

**Hvat samfelag vilja vit geva okkara børnum at liva í**
Hvat samfelag ynskja vit at okkara børn skula vaksa upp í. Hvat samfelag ynskja vit at okkara børn skulu geva okkara ommu- og abbabørnum at liva í. Útlendingapolitikkur er eitt rættuliga álvarsligt mál ið kann fáa størri ávirkan á okkum øll, enn vit beint her og nú geva okkum far um. Um vit ivast so kunna vit jú spyrja tey lond ið nú hava gjørt royndirnar og tískil hava fingið avleiðingarnar av teirra útlendingapolitikki.

*Keldutilfar: Islam og terrorisme av Mark Gabriel 2002*